# 9. ríkisgóðkendi grannskoðarin

**Hans Laksá, sum starvast hjá Rasmussen og Weihe hevur staðið royndina sum ríkisgóðkendur grannskoðari**

GRANNSKOÐARI
*Jákup Mørk*

32 ára gamli Hans Laksá úr Havn, hevur seinastu 12 árini starvast hjá Rasmussen og Weihe. Við síðuna av arbeiðinum hevur hann hesi árini nomið sær útbúgving innan økið, og nú um dagarnar stóð hann seinastu royndina í so máta, tá hann var til próvtøku sum ríkisgóðkendur grannskoðari.

Hóast 32 ár er ein ógvuliga ungur aldur innan økið, so heldur Hans sjálvur, at hetta ikki hevur verið so øgiliga stríggið at koma ígjøgnum.

- Tað er jú eisini áhugi. Tað kann vera, at tú skalt vera eitt sindur egin, um tú skalt tíma hetta, men hjá mær hevur hugurin alla tíðina verið til tað. Eg fór mest sum alt undir HD-lesna, tá eg byrjaði í starvinum. Í 2002 var eg liðugur við cand.merc.aud, sum er ástøðiligi parturin av ríkisgóðkenniningi, og síðani tá havi eg fyrireika meg til hesa próvtøkuna.

Við hesum er talið av virknum ríkisgóðkendum grannskoðarum í Føroyum komið á 9. Hjá Rasmussen og Weihe hevur stjórin, Klaus Rasmussen, verið einsamallur um góðkenningina, síðani Carl Wilhelm Weihe, sáli, andaðist, men við eini góðkenning í fyritøkuni er helst lagt upp til onkrar broytingar í bygnaðinum. Enn er tó ikki greitt, hvørt talan møguliga verður um eitt slag av partnarskapi, soleiðis sum tað er hjá eitt nú Spekt, har fimm starvsfólk hava góðkenning, og har øll eiga sín lut í virkinum, sum Pauli Ellefsen átti einsamallur fram til 1998.

Tey níggju, sum nú hava heitið sum ríkisgóðkendir grannskoðarar í Føroyum, eru: Hans Laksá og Klaus Rasmussen hjá Rasmussen og Weihe. Jógvan Amonsson hjá Inpact. Pauli Ellefsen, Súni Schwartz Jacobsen, Árni Ellefsen, Finnbjørn Zachariasen og Mirjam Haraldsen hjá SPEKT og Símun Absalonsen, sum eigur og rekur ADS-grannskoðan.



*Hans Laksá hevur nú staðið royndina sum ríkisgóðkendur grannskoðari. Hann er í løtuni tann yngsti í Føroyum, sum hevur hesa góðkenning*

# *Grund 2* útkomin

**Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur nú út annan part av endurminningum hjá Steinbjørn B. Jacobsen**

ENDURMINNINGAR

Steinbjørn telist millum teirra, sum flest allir føroyingar kenna, síðan hann seinast í sekstiárunum kom heim aftur eftir lokna læraraútbúgving í Danmark. Hann gjørdi brátt vart við seg sum rithøvundur og ein maður, ið ikki smæðist at bera sínar hugsanir fram í skrift og talu.

### Virðing og eymleiki

Steinbjørn er sandvíkingur, fiskimaður, lærari, háskúlastjóri og rithøvundur. Í fjør kom fyrsti partur av forvitnisligu endurminningum hansara, *Grund 1*, sum høvdu støði í uppvøkstrinum í Sandvík í 40- og 50-árunum. Annar parturin av endurminningunum byrjar, tá ið hann fer upp á Tvøroyri at ganga í realskúla. Hann lýsir skúlalívið og ymiskt, ið hendi hesi árini á Tvøroyri. Í frítíðini er hann í feitilendi, úti og skjýtur fugl og eisini í Lítlu Dímun og fleygar lunda. So fer hann til skips; fyrst við Yvonnu, ið Jóan Petur hjá Móritsi førdi, við línu og snøri undir Grønland og seinni á sild. Síðan við íslendskum útróðrarbáti og trolara.

Við virðing og eymleika lýsir hann bygdamenninar og skipsfelagarnar og skrivar livandi um lívið um borð á bæði danguni, útróðrarbátinum og trolaranum. Fyri lesara, ið ikki hevur upplivað slupplívið og bara hoyrt um línu- og snørisfiskiskapin undir Grønlandi og sildafiskiskapin við gørnum undir Føroyum, er hetta stak áhugaverdur lesnaður. Eisini lýsingin av útróðri í Íslandi og trolaralívið har, sum mangir føroyingar upplivdu í fimtiárunum. Sum vera man, verða samfelagsviðurskifti mangan havd á lofti; serliga sjónski munurin á Føroyum og Íslandi tá.

Hann fer so til Danmarkar at lesa til lærara, og bókin endar, tá ið hann við konu og nýføðingi vendir aftur Føroya at starvast sum lærari.



*Endurminningarnar eru enn eitt dømi um, at Steinbjørn B. Jacobsen er maður, ið ikki smæðist við at bera sínar hugsanir fram*

### Konsekventur

Sum lesari situr tú eftir við kenslu av, at rithøvundurin er sera konsekventur maður: hevur hann tikið eina avgerð, so vendist ikki aftur. Tá ið hann hugsar um lívsleiðina, skrivar hann soleiðis:

”Sjálvur var eg í roynd og veru losnaður frá bygdini, tá ið eg fór upp á Tvøroyri at ganga í skúla. Men í minninum um hetta summarið er einki sorgblítt beinleiðis farvæl. Alt, sum eg havi upplivað við ”Yvonnu” og í Íslandi, fyllir sinnið, og ikki um at tala framtíðin. Hugt verður frameftir.

Um eg longu tá hevði tikið yrkingina: *Har hånd du lagt på Herrens plov, da se dig ej tilbage*, til mín, minnist eg ikki. Kanska fekk eg ikki tá sett orð á hesar kenslur, men tær hava verið har fyri tí. Og soleiðis mundi tað vera hjá fleiri. Nógvar óítøkiligar hugsanir og ætlanir, meðan gerandisdagurin gekk sína vanligu gongd. Men summar ætlanir vóru til veruleika í broyttum líki.”

# Bókadagurin 2005

**Upplestur, framløga og kjak verður nakað av tí, ið er á skránni á árliga Bókadegnum, sum verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin**

BÓKADAGUR

Sunnudagin 11. desember kl. 15.00 bjóða Rithøvundafelag Føroya og Norðurlandahúsið til Bókadag 2005

Skráin fyri dagin er hendan:

Eftur at Mikkjal N. Helmsdal hevur innleitt dagin, verður upplestur úr nýútkomnum verkum í Klingruni. Høvundarnir, sum fáa 10 min hvør, verða hesir:

Dagny Joensen lesur úr skaldsøguni *Hvirlan*

Elias Askam lesur úr skaldsøguni *Messias II/ Synd drepur Gud*

Heðin M. Klein lesur úr savninum *Nú ríður tú heim*. Í savninum eru yrkingar, sum Heðin hevur enduryrkt eftir norska skaldið Olav H. Hauge.

Vida Højgaard lesur upp úr skaldsøgu síni *Mørk.*

Dávur í Tjørnuvík og Sveinur Í. Tummasson siga og greiða frá um fyrsta bindi av ævisøguni hjá Dávi, sum fevnir um árini frá 1911 til 1937.

Steðgur: Petur Pólson syngur og spælir løg av nýútkomnu fløgu síni *Koma.*

Firouz Gaïni lesur úr bók síni *Gávur skulu rindast aftur.*

Oddfríður Marni Rasmussen lesur yrkingar úr nýggjasta savni sínum.

Carl Jóhan Jensen lesur upp úr bók síni Ó- / søgur um djevulsskap.

Steinbjørn B. Jacobsen lesur upp úr endurminningum sínum *Grund 2.*

Framløga: Dávur Jacobsen greiðir frá um Íslendskaføroyska orðabók.

Pallborð í forhøllin um evnið: “Bókaútgáva í Føroyum/ kor og líkindi”

Orðstýrari er Ivan Niclasen

Við pallborðið sita: Helena Dam á Neystabø, Føroya skúlabókagrunnur, Niels Jákup Thomsen, Bókadeild Føroya lærarafelags, Jústinus Ejdesgaard, Rithøvundur, Forlagið Hellurnar, Rói Patursson, Mentanargrunnur landsins, Zakarias Wang, Felagið føroysk bókaforløg

Í sambandi við bókadagin hevur Bókasølan í SMS nýútkomnar bøkur til sølu í forhøllini.

Bjargingarútger til skip og bátar
• Neyðrakettir og hondblúss
• Bjargingarvestar og kransar
• Flótidraktir
• Pioneer plastbátar –nógv model!
Vit útvega alt bjargingarútgerð uppá fyrispurning
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

Atlas Copco
boriútgerð & borstál:
· Grótborar
· Meitlar/kílar
· Borimaskinur
· Brekkarar
· Luftslangur
· Smyrjitól
· Vatnútskiljarar
· Kompressarar
Til sølu & leigu
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

HONDA
Streymgeneratorar

HONDA
• Streymgeneratorar
• Vatnpumpur
• Grund/Dykkpumpur
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

BT-LYFTIVOGNAR
eru á goymslu
Føroya mest seldi lyftivognur vegna góðsku
Eykalutir og tænasta

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

Oljuovnar
Til bátin, summarhúsið og aðrastaðni
Fleiri sløg
RØR og aðrir eykalutir

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

Sløkki- og neyðútgerð
• Brandslangur
• Slanguvognar
• Eldsløkkjarar
• Brandteppir
• Forbindsskáp
• Børur
Vit útvega flest alla útgerð innan sløkki- og neyðútgerð.
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00